Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um koppsetingarætlanina, ið ikki varð fylgd, settur landsstýrismanninum við heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Í dag, 3. marts 2021, eru 4.190 fólk, ið hava fingið fyrru koppsetingina, meðan 2.523 hava fingið seinnu koppsetingina. Hvussu nógvar av hesum tilsamans 6.713 koppsetingunum eru latnar uttan um almennu koppsetingarætlanina?
2. Hvørji fólk er talan um, sum eru koppsett uttan um koppsetingarætlanina, og hvørjar grundgevingar hava verið fyri at gera hesi frávik frá ætlanini?

Viðmerkingar
Sambært heimasíðuni Corona.fo, sum Heilsumálaráðið og Landslæknin umsita, eru tað í dag, 3. mars 2021, 4.190 fólk, ið hava fingið fyrru koppseting fyri COVID-19, meðan 2.523 eisini hava fingið tað seinna prikið. Hetta eru 6.713 koppsetingar tilsamans. Í Degi og Viku í gjárkvøldið varð staðfest, at privatar fyritøkur og sendifólk Føroya uttanlands eru koppsett uttan um koppsetingarætlanina, meðan fólk í serligum smittuvanda, herímillum fjølbrekað, framvegis hvørki eru koppsett ella hava fingið vitan um, nær tey kunnu vænta at verða koppsett.[1]

Dømini um frávik frá koppsetingarætlanini eru tvey tilvildarlig dømi, sum Kringvarp Føroya hevur frætt um. Til tess at fáa greiðu á, um tað eru fleiri, sum eru koppsett uttan um koppsetingarætlanina, hvørji fólk talan er um, (her verður tó ikki hugsað um nøvn, men meira um størv o.a.) og hvørjar grundgevingar eru fyri at gera frávik, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 3. mars 2021

Ingilín Didriksen Strøm

1 Kringvarp Føroya, 2. mars 2021, kelda: https://kvf.fo/dv?sid=121058